átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Guds náði



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

### Arbeiðið upp á tykkara egnu frelsu við ótta og bivan

**(Filippibrævið kap. 2, 12 b)**

Óttin fyri at missa ta frelsu, ið Jesus hevur vunnið, er eitt gott tekin um, at hin sanna náðin býr í hjarta menniskjunnar. Hóast tað kann tykjast sum veikleiki í trúnni, at menniskja ikki altíð følir eina fulla vissu, so er tað kortini eitt gott tekin, at tað kennir sín veikleika og mótstøðuna frá fíggindanum, soleiðis at tað óttast fyri at missa sín dýrasta skatt. Tað sýnir at Guðs náðigáva er vorðin dýrabar fyri tí, og at tað ikki kann vera hana fyri uttan. Tí natúra menniskjunnar er soleiðis innrættað, at um okkurt er henni veruliga kært og virðismikið, er hon tilsvarandi bangin fyri at missa tað.

Eiga vit bara smá virði, eru vit ikki bangin fyri tjóvum. Men goyma vit dýrabar virði í húsunum, kennist tað sum allir tjóvar vita av tí, og tá finnist ikki rúm, ið er nóg trygt at goyma tey í.

Tann, ið ongantíð er bangin fyri at missa sína sælu, virðir hana heldur ikki serliga nógv. Tá er tað betri, at tú hvørja løtu kennir ótta fyri at missa hana. Ein eldri lærari hevur sagt tað soleiðis: "Tá ið eg hugsi mær tann møguleika at eg ein dag skuldi mist gudsóttan og trúnna, tá gerist eg deyðaræddur."

Hetta vitnar um at andin ger ein gerning í hjarta okkara, soleiðis at náðin er ómissilig fyri okkum. Tann, ið er bangin fyri at missa Guðs náði, skal troystast við Guðs náði. Amen!

# Vilja læra samkomuna at biðja

**Lívdin**: - Hví svarar Gud ikki bønum mínum við tað sama?

Hetta er ein av spurningunum, sum limirnir í samkomuni Lívdini í Hoyvík hava verið savnað um hesi seinastu týskvøldini.

Samkoman hevur nevniliga sett sær fyri at læra meiri um henda týdningarmikla partin av kristinlívinum. Tí eru tey farin undir serstøk bønarkvøld hesi týskvøldini og fram til summarfrítíðina.

Á hesum kvøldunum verður undirvíst í bøn og hvat bøn er.

### Erligt tos um bøn

Undirvísarin, Jógvan Zachariasen sigur soleiðis um skeiðið:

– Mong stríðast við grundleggjandi spurningar um bøn, hvussu ein kann læra at biðja rætt og um vilja Guds.

– Vit ynskja við hesum bønarskúlanum at hjálpa hvørjum øðrum at tosa opið um okkara bønarlív, og erliga ásanna okkara hugburð til bøn.

Ætlanin er kortini ikki bert at undirvísa. Sum ein natúrligan part av hesum týskvøldsmøtunum er ætlanin somuleiðis at hava lovsang.

Her verður lært um, hvønn týdning tilbiðjan í sangi og tónleiki hevur í gerandisdegnum hjá einum trúgvandi.

Bønarskúlin í Lívdini byrjaði 16. januar og verður hildið á til komið er út í juli mánað. Ætlanin er at halda fram við hesum skúlanum í heyst, tá tey fara at tosa um bønarlívið hjá Jesusi.



*– Nógv stríðast við spurningum um bøn, sigur Jógvan Zachariasen*

# Hjúnabandsskeið stóra undirtøku

**Keldan**: – Vit høvdu sjálvandi vónað at nógv fóru at tekna seg til skeiðið. Men at tað skuldu verða so nógv, tað kom púra óvart á okkum, upplýsir Jastrid Høj, sum er ein av stigtakarunum til Alpha-hjúnabandsskeiðið í Kelduni í Skálafirði.

Hetta skeiðið er ætlað øllum øðrum, sum ynskja at arbeiða við sínum hjúnalagi, og tá er líkamikið um tey hava verið gift í minni enn tvey ár ella meiri enn 30.

– Tey, sum hava tað gott í hjúnalagnum, kunnu kortini fáa gleði av einum slíkum skeiði. Og tey, ið hava trupulleikar, kunnu fáa hjálp at koma víðari, verður sagt.

Skeiðið sjálvt er eitt samstarv millum samkomurnar í Kelduni og Lívsins Orð, og byrjaði í farna mánaði. Á skeiðnum verða sjey ymisk evni viðgjørd, m.a. um hvussu ein loysir trupulleikar í hjúnalagnum, eitt gott sexlív, fyrigeving og viðurskiftini við foreldur og verforeldur.

Skeiðið verður fyriskipað annaðhvørt hóskvøld, og verður møtt næstu ferð hósdagin í komandi viku, tá evni er samskifti. Skeiðið endar 26. apríl.

Við á skeiðnum eru 31 pør og koma tey úr ymiskum samkomum, m.a. úr Heimamissiónini, Getsemane, Kelduni og Lívsins Orði.



## Fleiri vilja giftast í kirkju

**Ongland:** Kirkjurnar í Onglandi hava seinastu árini upplivað ein ótrúliga stóran vøkstur av kirkjuligum brúdleypum. Men henda gongdin hevur kortini lítið við religión at gera.

Hetta er úrslitið av eini kanning, sum The Henley Centre hevur gjørt fyri Church of England. Íalt vórðu 1800 fólk sum giftu seg í eini kirkju.

Niðurstøðan í kanningini er greið: Bert helmingurin av teimum spurdu valdu eitt kirkjubrúdleyp av religiøsum orsøkum. 77 % góvu sum orsøk fyri hesum at tey ynsktu eitt rættiligt brúdleyp, meðan 69 % søgdu at plaseringin av kirkjuni hevði avgerandi týdning.

Tey vanligu kirkjuligu brúdleypini hava framvegis stóran áhuga, tí nógv ynskja at gera hetta í eini eksklusivari kirkju í vøkrum umhvørvi.

## Gamal aðalskrivari tekur við

**Bláikrossur:** Tað hevur ikki enn eydnast Bláakrossi at fáa nýggjan aðalskrivara eftir Jaspur Langgaard, sum er farin í annað starv.

Á fundi í landsnevndini herfyri varð samtykt at seta verandi kunningarleiðaran, Asbjørn Jacobsen í hetta starvið, til ein nýggjur er funnin. Hann er ikki ókendur í hesum starvinum, tí frá 1995 til 2003 var hann aðalskrivari í Bláa Krossi.

Ásbjørn hevur longu tikið við starvinum.

## Suðurkorea í bøn fyri Norðurkorea

**Kirkjur:** Alt árið í ár hava kirkjurnar í Suðurkorea sett av sum eitt bønarár fyri kommunistiska Norðurkorea. Hetta er samstundis ein partur av 100 ára hátíðarhaldinum fyri stóru vekingini í norðurkoreanska høvuðsstaðnum.

Í 1907 var ein stór kristin veking í Norðurkorea. Tá kommunistarnir tóku yvir í 1948 var núverandi høvuðsstaðurin Pjongjang nevndur sum Eysturasiatiski Jerúsalem.

Nú hava kirkjurnar í Suðurkorea, har 25 % av fólkinum eru kristin, avgjørt at grannalandið fyri norðan er málið fyri eitt serligt bønarátak í 2007.

Norðurkorea verður í dag mett sum landið, har flest kristin verða forfylgd fyri trúgv sína.

Sosialurin